## Park og Neville verða løntir

Ivasamt hevur verið við framtíðini hjá Gary Neville og Ji-Sung Park í Manchester United, men nú rør venjarin Sir Alex Ferguson fram undir, at teir báðir fáa nýggjar sáttmálar við felagið. Gery Neville, sum er liðformaður í United, hevur verið illa skaddur seinastu tvey árini, men nú spælir hann aftur. Og úrslitið veðrur helst ein nýggjur sáttmáli. Tað sama er galdandi fyri I-Sung Park, sum hevur 18 mánaðir eftir av sínum sáttmála.




## N'Zogbia vil til Arsenal

Charles N'Zogbia, sum seinnu árini hevur spælt fyri Newcastle, vil sleppa at skifta felag. Hann er troyttur av at spæla fyri Newcastle, sum er í støðugum ítróttarligum trupulleikum, og tað fjalir N'Zogbia heldur ikki útyvir. - Triðja árið á rað liggja vit í botninum, men eg havi sett mær sum mál at vinna nakað, og tí má eg helst skifta felag. Eg droymi mest um at spæla fyri Arsenal, sigur N'Zogbia við Le 10 Sport.

# Milliardir uttan úrslit



*Hóast felagið í dag má roknast sum heimsins ríkasta, so hevur Mark Hughes enn ikki megnað at lyft Manchester City móti nøkrum stórvegis heiðuri enn*

**Trýstið er stórt á Mark Hughes, sum enn hevur til góðar at prógva, at hann er rætti maðurin at leiða Manchester City upp á ensku tindarnar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrstu uppgávurnar hjá Mark Hughes í Manchester City vóru annars yvirkomuliga, tá felagið sendi EB/Streym úr UEFA-Cup kappingini.

Men við nýkeypum í tí heilt dýra flokkinum varð roknað við, at Manchester City skuldi annað og meira enn at standa seg hampuliga væl í UEFA-Cup kappingini.

Í Premier League hevur tó als ikki gingist eftir vild, og leygardagin dumpaði felagið so ruddiliga í FA-Cup kappingina, tá tað á heimavølli gjørdist til 3-0 tap móti Nottingham Forest.

Men hóast hetta, so heldur Mark Hughes ikki, at eitt venjaraskifti er nakað, sum skal koma upp á tal.

- Eg veit akkurát, hvat okkum tørvar, og vit arbeiða hart hvønn dag fyri at røkka hesum. Men sjálvandi skal tú eisini vísa dygirnar í dystum, og tað vóru tað ov nógvir, sum ikki gjørdu í dag, segði venjarin við ensku miðlarnar eftir dystin.

Í ensku miðlunum verður sagt, at Hughes hevur á leið £60 mió at styrkja um hópin við í januar mánaði. Fyrsta keypið er longu gjørt, tá Chelsea fekk á leið £12 mió fyri Wayne Bridge.

## Úrslit, 3. umfar

| | |
|---|---|
| Hartlepool Utd-Stoke City | 2-0 |
| Sunderland-Bolton | 2-1 |
| Chelsea-Southend Utd. | 1-1 |
| Coventry-Kidderminster | 2-0 |
| Manchester C-Nottingham F | 0-3 |
| Cheltenham-Doncaster | úts |
| Millwall-Crewe Alexandria | 2-2 |
| Cardiff-Reading | 2-0 |
| Charlton-Norwich | 1-1 |
| WBA-Peterborough | 1-1 |
| Torquay-Blackpool | 1-0 |
| Kettering T.-Eastwood T. | 2-1 |
| Leyton O.-Sheffield Utd. | úts |
| Histon-Swansea | úts |
| Ipswich-Chesterfield | 3-0 |
| Forest Green-Derby | 3-4 |
| Birmingham-Wolves | úts |
| West Ham-Barnsley | 3-0 |
| QPR-Burnley | 0-0 |
| Leicester-Crystal P. | 0-0 |
| Middlesbrough-Barrow | 2-1 |
| Arsenal-Plymouth | 3-1 |
| Hull-Newcastle | 0-0 |
| Portsmouth-Bristol C. | 0-0 |
| Macclesfield-Everton | 0-1 |
| Sheffield W.-Fulham | 1-2 |
| Watford-Scunthorpe | 1-0 |
| Preston NE-Liverpool | 0-2 |
| Gillingham-Aston Villa | 1-2 |
| Southampton-Manchester Utd. | 0-3 |

## 4. umfar

Liverpool-Everton
Manchester Utd.-Tottenham
Hull/Newcastle-Millwall/Crewe Alex
Sunderland-Blyth/Blackburn
Hartlepool-West Ham
Leyton O./Sheffield Utd.-Charlton/Norwich
Cardiff-Arsenal
Portsmouth/Bristol C.-Histin/Swansea
Chelsea/Southend-Ipswich
Cheltenham/Doncaster-Aston Villa
WBA/Peterborough-QPR/Burnley
Torquay-Coventry
Kettering-Fulham
Watford-Leicester/Crystal P.
Derby-Nottingham Forest
Birmingham/Wolves-Middlesbrough

# Chelsea snávaði á heimavølli

**Móti Southend úr triðju bestu ensku røðini eydnaðist bert hjá Chelsea at fáa javnleik**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsti stóri FA-Cup dagurin í ársins útgávu av enska fótbóltsárinum var um vikuskiftið, tá stóru liðini traðkaðu inn í kappingina.

Og hesa ferð kom fyrsta sensatiónin á Stamford Bridge, har Chelsea í eini rættiliga sterkari uppstilling bert spældi 1-1 javnleik móti Southend.

Chelsea kom annars á odda tíðliga í dystinum við einum máli frá Kalou, og síðani var talan fyri tað nógva um stórt trýst frá heimaliðnum.

Tað eydnaðist tó ikki at økja um leiðsluna, og tá klokkan fór um teir 90 minuttirnar kundi Peter Clarke syrgja fyri sensatiónini og nýggjum heimadysti til Southend.

Hetta økir uttan iva um trýstið á Scolari, sum er venjari í Chelsea.

Eisini Stoke var fyri óvæntaðum tapi leygardagin, tá teir á útivølli máttu lúta 2-0 móti Hartlepool.

Tann dysturin, sum hevði størsta áhugan leygardagin, var helst tann hjá Liverpool, sum á útivølli spældi móti Preston.

Liverpool er eitt av teimum heilt stóru feløgunum í Onglandi, men áhugin hesa ferð snúi seg meira um liðskiparan hjá felagnum, Steven Gerard, sum undan vikuskiftinum varð handtikin eftir ein býtúr, sum eftir øllum at døma endaði heldur harðliga.

Heimaáskoðararnir royndu eisini at geva Gerard síni minni vøkru orð við á vegnum, men hetta helt ikki Liverpool frá at fara avstað við einum 2-0 sigri. Og gleðin gjørdist ikki minni, tá Fernando Torres var maðurin, sum beint undan leikloki økti til 2-0. Hetta var fyrsti dysturin hjá Torres í drúgva tíð, eftir at hann hevur verið plágaður av skaða.